*Jákup Olsen, tingmaður*

# Oljan er lívsneyðug fyri okkum føroyingar

*- Nú er nokk við fagurlittum orðum um tjóðskap o.a. Nú er tað sannleikin, sum er galdandi. Vit eiga at seta nýggja grein í fíggjarlógina, sum eitur oljuvinna. Setið 50 mill. har sum eina byrjan. Segði Jákup Olsen, tingmaður fyri KRFF undir fíggjarlógar viðgerðini. Hann segði m.a.*

JAN MØLLER



*Jákup Olsen, tingmaður heldur at oljuvinnan eigur at koma á fíggjarlóg sum sjálvstøðug grein*

I dag kunnu vit einki gera við Framtaksgrunnin, sær tað út til. Vit kunnu kanska heldur einki gera við Fíggjargrunnin frá 1992, sjálvt um vit á pappírinum eiga Fíggjargrunnin og helvtina av Framtaksgrunninum. Hvat kemur at henda við Bankanum, vera vit ikki eisini ov seinir har? Tað er heilt týðuliga planlagt, nær Fíggjargrunnurin frá 1992 hevur útspælt sína rollu, tað verður í somu løtu, tá ið klárt verður til Oljuaktivitetin hjá A.P. Møller í Føroyum. Tá selur Fíggjargrunnurin Bankan og Den Danske Bank og harvið A.P. Møller yvirtekur. Tí er tað umráðandi at vit gera eina serliga lóg - serlóg í sambandi við fremmandan kapital, sum ætlar sær at yvirtaka oljuvinnuna. Tí er tað nærmast sagt **ein katastrofa**, at vit ikki á hesum fíggjarætlan og fyri alt tað í fleiri ár hava avsett minst 50 milliónir árliga í oljugrunn fyri sjálvir at vera við á hesum øki, segði Jákup Olsen, sum helt, at vit eisini eiga at uppsiga allar avtalurnar við danir og seta út í kortið av nýggjum, um Føroya Løgting er at sær komið fyri at gera eina røð av serlógum fyri at vísa dønum, hvar tann føroyski fólkaviljin er.

**Oljan á fíggjarlógina!**

- Kannar ein hesa ovurbonds stóru bók - Fíggjarlógina - so eru ikki tær heilt stóru broytingarnar farnar fram frá árunum frammanundan, og tú finnur framvegis ongan póst, sum eitur Oljuvinna.

Eitt má sláast fast, at vit føroyingar eiga oljuna eins og vit eiga landið.

Nú, ið konstaterað er, at olja finst í undirgrundini, eru vit við eitt vekk vorðin heimsins ríkasta tjóð pr. íbúgva. Fólk vita hetta bara ikki, men vit onnur, ið vita, kundu greitt fólki frá hesum.

Nú er nokk við fagurlittum orðum um tjóðskap og annað, nú er tað veruleikin, ið er galdandi. Vit mangla eina álvarsama grein á fíggjarlógini, sum eitur oljuvinna, soleiðis at vit sjálvi kunnu bora - ella bora saman við øðrum. Endamálið má vera púra greitt. Har ein útlendingur er í oljuvinnuni má ein føroyingur verða honum undir lið. Føroyingar kunnu føra øll skip, flúgvarar ja sjálvt tanks hjá øðrum. Vit kunnu eisini vera við tá bora eftir olju. Vit hava nógvar góðar menn í oljuvinnuni hjá øðrum, fáið teir heim! Sendið verkfrøðingar eitt ár á eini verstøð í Noregi ella Aberdeen fyri at studera oljuvinnu. Vit sóu, hvussu gekst í Lopra. Menn vóru langt frá professionellir. Skipasmiðjan í Vági var standby og tá vísti seg skjótt, at teir máttu seta tornið upp. Hinir dugdu snøkt sagt ikki, og sama lagið hevur verið við boringini. Landsverkfrøðingurin saman við føroyingum høvdu skjótt lært at bora saman við nakað av útlendskari ekspertisu. Soleiðis var eisini, tá ið vit gjørdu tær fyrstu tunnilirnar. Nú hava vit gjørt tær sjálvir.

Eg dugi ikki at síggja, hví 50 mill. um árið eru so nógvir pengar. Tað tók bert eitt eygabilkk at seta 75 mill. í flogfelagið ella 50 mill. í ALS. Oljan er lívsneyðug fyri okkum føroyingar, tað er seinasta vón okkara, missa vit hana er eingin von eftir. Tá vóni eg, at ein nýggjur póstur, sum eitur oljuvinna, er komin aftur, tá ið uppskotið kemur aftur til 2. viðgerð.

Ynski mítt skal vera, at Føroya Løgting má standa saman sum ein maður í hesum okkara lívsneyðuga máli. Danir ekspropieraðu bæði tann føroyska fíggjarheimin og alla okkara høvuðsvinnu, tá **má** og **skal** ikki eydnast teimum at taka oljuna eisini, segði Jákup Olsen undir 1. viðgerð av fíggjarlógini á tingi.


**Trygdarskeið**

Um nóg nógv tekna seg, byrjar trygdarskeið á Klaksvíkar Sjómansskúla mánamorgunin 28.10. kl. 08.00. Kostnaðurin er 2.000,- kr. Tekning á tlf. 56128

**Klaksvíkar Sjómansskúli**

**Skippere, Maskinister & Linefiskere**

Oddvar Vea A/S er registrert i Haugesund, Norge. Selskapet driver flere fiskefartøy og vaktfartøy i Nordsjøen. I tillegg driver selskapet fryselinebåten M/S Cindy (ex. Sigurfari) som fisker etter Patagonian Toothfish med base i Cape Town i Sør Afrika.

Vi vil i løpet av kort tid utruste og sette i drift 3 fryselinebåter i samme området som M/S Cindy. I den forbindelse søker vi etter dyktige skippere, maskinister og linefiskere. Fartøyene vil bli registrert under Vanuatu flagg.

Vi kan tilby gode lønnsavtaler og friordning.

Kun skriftlig henvendelse med kopi av attester sendes innen 10.11.96 til:

**Oddvar Vea A/S**
**Postboks 531**
**5501 Haugesund**
**NORGE**

**Alt el-arbeiði verður gjørt**

**Sæbjørn Poulsen**
*Góð. El-innleggjari*

Skorugøta 3
FR-100 Tórshavn
Tlf. 19039 - Fartlf. 83039

**Frá *Suðurstreymoyar Javnaðarfelag***

**3. uppstillingarfundur til býráðsvalið**

verður í Felagshølunum á Argjum mánadagin 14. oktober, kl. 19.30

**Nevndin**